# Heimur ísbjarnana

**Klaus Kiesewetter heldur fyrilestur og ljósmyndir um Svalbard**

ÆVINTÝRFERÐ
*Tíðindaskriv*



Kendi týski ævintýrarin og upptøkumaðurin, Klaus Kiesewetter, sum í mong ár búði í Føroyum, hevur tikið nakrar sjáldsamar og einastandandi ljósmyndir í Svalbard, sum hann ætlar at vísa fram fyri almenninginum.

Tiltakið verður mikudagin 4. september kl. 19.30 í Kappróðrarneystinum niðri á Støð á Glyvrum og hósdagin 5. september kl. 19.30 í skúlanum á Skála. Fyrilesturin tekur umleið 1-2 tímar og kostnaðurin er kr. 60 fyri hvønn.

Klaus greiður sjálvur frá um ferðina í Svalbard, sum eisini verður nevnd Heimur Ísbjarnana. Hann kemur at greiða frá siglingini frá Hamburg til Nordkap í Noregi og víðari til Bjarnoynna, har ferðaliðið varð sett í land av “Zodiacs” á norðurstrondini tætt við norsku veðurstøðina, har 12 fólk búgva fast alt árið.

Greitt verður frá gongutúrinum til eina vík, nevnd “hvalrossbugten”, har um 600 roysningar vórðu dripnir um dagin, til russisku loðskinn-fangaragravirnar og leivdirnar av eini týskari fiskiísstøð frá 1906. Síðani verður siglt til Svalbard gjøgnum ís, og gjøgnum Hinlopenssundið millum Norðaustland og Spitsbergen. Ymisk søgulig støð verða vitjaði á leiðini, m.a. flogstøðin hjá Amundsen og Nobiles í Ny Ålesund og ballónstøðin á “Danskøen”, har svenskarin Andrées í 1897, sum fyrsta fólk, royndi at flúgva til Norðurpólin. Størsta norðatlantiska hvalastøðin frá 17. hundratalinum verður vitjað, eins og russiski kolgravarabýurin Barentsburg, har vit eisini uppliva norðasta bóndagarðin í heiminum.

Hetta og mangt annað fær ein høvi at uppliva til fyrilesturin. Við nærmyndum av ísbjarnum, roysningum og kópum fæst ein uppliving fyri lívið, siga Mentanarhúsfelagið í Runavíkar Kommunu & Skála Kommuna í tíðindaskrivi.






# Politistur

**Eitt arbeiði við avbjóðingum**

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribygja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

**Eitt arbeiði allan sólarringin**

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.



Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

**Løn og útbúgving**

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið– fast starv sum politistur.

**Menning og karriera**

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



**Ynskir tú at vera við?**

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelaganum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflyggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 48 48 ella 31 82 66
Heimasíða: www.politi.fo


Bilar
Nr. 164 • hósdagur • 29. august 2002 • 76. árg.


DAGBLAÐIÐ
FRÍGGJADAGIN 29. AUGUST 1952 18. ÁR
...YSKU SKÓTARNIR HEIMKOMNIR ÚR NOREG ... ÚR ÍSLANDI
Fyrsti týski „fólkavognurin" Í FØROYUM
Mikudagin lögdu havnarfólk ivaleyst merki til ein nýggjan bil sum koyrdi í Havn og sum líktist einum

# Fólkavognurin 50 ár í Føroyum

**Týsdagin 27. august vóru liðin 50 ár síðan Carl Herup Olsen, mikudagin 27. august í 1952, sýndi blaðmonnum í Havn fyrsta Fólkavognin í Føroyum. Í ár eru eisini liðin 25 ár síðan sølan av VW/Audi bilum byrjaði í Hoyvík**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*



*Núverandi VW umboðsmaður í Føroyum, Øssur Johannesen, saman við Carl Herup Olsen, ið seldi fyrsta VW bilin í Føroyum tann 27.august í 1952*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í Dagblaðnum fyri 29. august 1952 stóð hendan greinin:

Fyrsti týski fólkavognurin í Føroyum

»Mikudagin løgdu havnarfólk ivaleyst til merkis ein nýggjan bil sum koyrdi í Havn, sum líktist einum bussi men var ikki størri enn ein bilur. Hetta er fyrsti av teimum sokallaðu fólkavognunum ið komin er til Føroya. Hann er keyptur til Carl Jensen í Kollafirði til rutukoyring. Umboðsmaður fyri fólkavognarnar í Føroyum er Carl Herup Olsen ið mikudagin vísti blaðmonnum vognin. Hann tekur 8-10 ferðafólk, motorurin er aftan.

Hetta slagið av vognum verður nýtt í Danmark og Noreg til drosjukoyring, men fólkavognar fáast eisini sum líkjast vanligum bilum, og teir hava eisini motorin aftan og bagagurúmið framman.

Sagt verður at vognarnir brúka lítið av bensini og motorurin er luftkøldur«.

## Farodane stovnað í Keypmannahavn

Carl Herup Olsen var tá stjóri á Farodane, ið umboðaði Fólkavognarnar í Føroyum. Á vári 1949 avgjørdu Poul Als Jensen og Carl Herup Olsen, ið arbeiddu hjá J.F.Kjølbro í Klaksvík, at gevast, og stovnaðu teir partafelag saman við Børge Husted-Andersen landsrættarsakførara. Poul Als og Carl Herup fluttu so báðir við familju til Keypmannahavnar, har teir stovnaðu A/S Farodane P/F. Teir byrjaðu við at selja ymiskar matvørur til handlar í Føroyum. Eisini keyptu teir føroyskan saltfisk og fryst rogn, ið blivu seld í Danmark og aðrastaðni. Fyri at hjálpa uppá søluna ferðaðist Carl Herup fleiri ferðir til Føroyar. Tað sást skjótt, at best mundi verða at Carl Herup bleiv fastbúgvandi aftur í Føroyum. Hann flutti tí heimaftur og bleiv 1. september 1950 leiðari av Farodane & Co., ið helt til í Bókbindaragøtu 6 í Havn.



*Fyrsti Fólkavognurin í Føroyum varð seldur 27.august 1952. Bussurin hjá Carl August Jensen keypmanni í Kollafirði, Fø135. Hann koyrdi rutu millum Kollafjørð og Vestmanna. Bussurin tók 8 ferðafólk. Viðførið, sum ikki passaði inn í bussin, varð lagt uppá takið*
*Myndaeigari: Børge Jensen*

Fyritøkan keypti og seldi nógvar ymiskar vørur.

## Fyrsti fólkavognurin til Kollafirðar

Um hetta mundið hevði A/S Skandinavisk Motor Co. í Keypmannahavn fingið aðalumboð uppá VW bilarnar í Danmark, Føroyum og Grønlandi. Deildin hjá Farodane í Keypmannahavn setti seg í samband við Skandinavisk Motor Co. um at lata teir fáa søluumboð fyri Føroyar. Tað var teimum játtað í 1952.

Teir gjørdu so avtalu við Hans Johs. Clementsen, sum tá hevði bilverkstað við Landavegin í Havn, um at standa fyri tænastu, eykalutum og umvælingum av VW bilunum. Verkstaðurin flutti í 1957 heim í Lucas Debesargøtu. Hans Johs. Clementsen hevði tænastuna alla tíðina meðan Farodane hevði VW umboðið.

Fyrsti VW bilurin varð tann 27. august í 1952, seldur til Carl August Jensen keypmann í Kollafirði. Hetta var ein bussur, ið tók 8 ferðafólk, ið hann koyrdi rutu við millum Kollafjørð og Vestmanna. VW bussarnir og vørubilarnir, vanliga nevndir »rugbreyð«, vórðu nógv seldir sum rutubilar og vørubilar hjá handlum og fyritøkum.

Fyrsti VW persónbilur »boblan« varð seldur til Hjalmar Jacobsen, el-verkstjóra, norðuri á Strond í Klaksvík. Hesin bilurin, nummar Fø315, bleiv skrásettur 17. juli 1953.

## Fimm umboð í 50 ár

Í 1954 flutti Farodane í nýggjan virkisbygning við Tinghúsvegin. Í fleiri ár høvdu teir framsýningarhølir og eykalutagoymslu í húsunum hjá Mikkjal Helmsdal við Hoydalsvegin, har Hans Johannes Clementsen hevði eykalutagoymsluna um hendur.

Fyrst í sjeytiárunum góvust Farodane og Hans Johannes sum VW umboð. Eftir tað seldu Føroya Motor Co. í Hornabø VW bilarnar, til Audi og VW bilverksmiðjurnar vóru lagdar saman og frá 1975 at roknað skuldu teir seljast av sama umboði. Tá fekk Norrøna v/Beinar Vestergaard, ið tá seldi Audi, umboð fyri bæði bilmerkini. Í 1977, tá Norrøna v/Beinar Vestergaard flutti í nýggjan virkisbygning í Hoyvík, kom Hans Johannes at arbeiða har sum serkønur í Fólkavognum. Frá 1. juli 1985 yvirtók Ásmund Joensen fyritøkuna í Hoyvík og VW/Audi umboðið. Í november 1993, meðan búskaparkreppan herjaði og bilasølan var heilt í botni, yvirtók Øssur Johannesen VW/Audi umboðið, í sama bygningi í Hoyvík. Bilasølan v/ Øssur Johannesen fekk í 1994, eisini umboð fyri sponsku Seat bilarnar, ið tá komu við í VW konsernina.



*Í 1954 flutti Farodane í nýggjan virkisbygning við Tinghúsvegin. Teir lýstu á endavegginum við VW bilum og øðrum vørum. Í dag stendur bygningurin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag frammanfyri hendan bygningin*
*Myndaeigari: Farodane*